# Barnaverndartænastan

fyri: Sørvágs-, Miðvágs-, Sandavágs-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunur

## Avloysari fyri leiðara til Barnaverndartænastuna

### Fyri Sørvágs-, Vága-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunu

Lýst verður eftir avloysara fyri leiðaran á Barnaverndartænastuni. Talan er um eitt farloyvisstarv fram til 31. oktobur mai 2009, ið verður lýst til setan 1. mai 2009 ella sum skjótast hereftir.

Barnaverndartænastan heldur til á skrivstovuni hjá Vága kommunu í Sandavági, nakað av ferðing má roknast í starvinum.

Arbeiðsøki er Sørvágs-, Vága-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunur umframt Tórshavn.

**Uppgávur og avbjóðingar:**
- leiðarin hevur dagligu leiðsluna av Barnaverndartænastuni
- leiðarin hevur ábyrgdina av at Barnaverndartænastan er ein vælvirkandi tænastudepil
- leiðarin hevur ábyrgdina av at tryggja eitt vælvirkandi tvørfakligt samstarv við tey fakfólk í økinum, ið vara av børnum og ungum
- málsviðgerð av Barnaverndarmálum
- umsiting av børnum við serligum tørvi, sbrt. § 5 í dagstovnalógini

**Førleikakrøv:**
- hóskandi ástøðiliga útbúgving
- kunnleika til sosiala økið, kommunal viðurskifti og fyrisitingarrætt
- leiðsluroyndir ein fyrimunur
- góð samstarvsevni

**Setunarviðurskifti:**
Starvið verður lønt í samsvari við fakligan førleika og royndir.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum og viðmælum til Barnaverndartænastuna, Postrúm 19, 360 Sandavágur skal verða Barnaverndartænastuni í hendi í seinasta lagi 20. apríl 2009 kl. 12.00.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jóngerð Nielsen, virkandi leiðara, tlf. 213960 ella Karl A. Olsen, formanní samstarvsnevndini, tlf. 770107.

Barnaverndartænastan tilskilar sær rættin til at søkja av nýggjum, um ikki nóg nógvar umsóknir eru til starvið.

Hammershaimbsvegur 1 • Postrúm 19 • 360 Sandavágur
Tlf. 333 960 • Fartlf. 213 960 • E-mail bvt@sandavagur.fo

# Callanetice-fimleikur

Callanetice-fimleikur byrjar aftur týsdagin 14/4.
Ringið til 580025 ella 744720 og teknið tykkum.

**Fuglafjarðar Kvøldskúli**

## Føroya Studentaskúli og HF-skeið

Hoydalar · FO-188 Hoyvík
Telefon 312973 - Telefax 318624
Teldupostur skrivstovan@hoydalar.fo
Avgreiðslutíð: Kl. 08.00 - 15.30

Treytað av góðkendum undirvísingarvirksemi verða frá 1. august 2009 at rokna 2-3 føst størv leys at søkja sum adjunktur/lektorur við faksamanseting ætlað til lærugreinaraðið í studentaskúlum og HF-skeiðum. Søkt verður eftir lærarum við eini samanseting av hesum lærugreinum:

**Alis-evnafrøði, evnafrøði, støddfrøði og sálarfrøði.**

Harumframt eru 14-16 ársvikariat í lærugreinunum:

**alis/evnafrøði, alisfrøði, danskt, enskt, evnafrøði, føroyskt, geografi, ítrótti, religión, samfelagsfrøði, støddfrøði, søga, tónleikur, týskt og vinnulívs-búskapur.** (Ársvikariat kunnu eisini søkjast í hesum lærugreinum saman við eini av lærugreinunum sum nevndar eru undir føstu størvunum.)

Umsøkjari, ið ikki hevur lokið prógv í námsfrøði fyri setanardagin, skal taka lut í innleiðsluskeið í námsfrøði, sum Mentamálaráðið skipar fyri í august 2009. Nýsett starvsfólk skulu sambært føroyskari kunngerð um námsfrøði hava staðið námsfrøðiliga útbúgving í seinasta lagi tvey ár eftir setanardagin.

Í sambandi við starvsetanina leggur skúlin dent á, at umsøkjarar hava kunnleika um føroyskt mál og føroysk samfelagsviðurskifti, og at umsøkjarar eru áhugaðir í at ogna sær hetta innlit. Skúlin leggur somuleiðis dent á góð samstarvsevni og at umsøkjarar virknir fara at taka lut í menningini av einum góðum námsfrøðiligum skúlaumhvørvi, har samstarv, kunningartøkni og nýggir arbeiðshættir eru týðandi tættir

Gjørt verður vart við tveyárasáttmálan, ætlaður umsøkjarum við vantandi føroyskum málførleika og vantandi kunnleika um føroysk samfelagsviðurskifti. Tað vil siga, at umsøkjarin verður settur í tíðaravmarkað starv fyri tvey ár. Skúlin rindar kostnaðin hjá umsøkjaranum fyri flyting og ferð fram og aftur millum verandi bústað og Føroya Studentaskúla og HF-skeið. Skúlin endurrindar í mesta lagi 30.000 kr. fyri flyti- og ferðaútreiðslur hvønn vegin - gevið gætur - upphæddin er skattskyldug. Ætlar umsøkjarin at halda fram í starvinum eftir tveyáraskeiðið, skal umsøkjarin søkja starvið av nýggjum á jøvnum føti við aðrar umsøkjarar. Áhugaðir kunnu venda sær til skúlan.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um skúlans stevnumið, um teir venda sær til leiðslu skúlans ella kunna seg á heimasíðu skúlans: www.hoydalar.fo

Umsókn á oyðublaði frá MMR, YF ella GL verður stílað og sent til

*Føroya Studentaskúli og HF-skeið,*
*att.: Mikkjal N. Helmsdal, rektari, Hoydalar,*
*FO – 188 Hoyvík, Føroyar*

í seinasta lagi 27. apríl 2009.

Avrit av próvtøkuskjølum ella úrskrift úr próvtøkuprotokoll skulu sendast saman við umsóknini. Setanarsamrøður fara fram í mai.

Lesið Sosialin -so eru tit við!



## STUDENTASKÚLIN OG HF-SKEIÐIÐ Í EYSTUROY OG KLAKSVÍKAR HF-SKEIÐ

Treytað av góðkendum undirvísingarvirksemi tørvar okkum komandi skúlaár undirvísarar í:

**Føroyskum, donskum, latíni, støddfrøði og tónleiki.**

Harumframt eru ársvikariat leys í:

**Ítrótti, søgu, heimspeki, samfelagsfaki, føroyskum og enskum** (hesar lærugreinir kunnu møguliga nýtast saman við lærugrein nevnd omanfyri)

Umsøkjarar við eini av omanfyrinevndu lærigreinum saman við aðrari lærugrein kunnu eisini søkja.

**Umsóknarfreistin er 27. apríl 2009.**
Á www.shey.fo liggur starvslýsingin í fullari longd.
Á www.gymnasiejob.dk liggur ein donsk útgáva.

**Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy**



Alt arbeiði innan bókhald, roknskap, MVG & ráðgeving v.m. verður gjørt.

Eisini átaki eg mær, at greiða tollskjøl o.a. fyri fyritøkur og einstaklingar, skjótt og bíliga.

Havi drúgvar royndir á økinum.

Vinarliga set teg í samb. Tlf. 21 52 28 ella send ein teldupost til behgra@kallnet.fo

# Flagtekkju?

Norska flagtekjur
Skjótt og ómaksleyst
Eisini hava vit nævir og torvhaldsjørn.
Ring og fá eitt óbindandi tilboð.

**SJÓVINNUBÚÐIN**

v/ Jákup á Lag · P.O. Boks 230 · FO-110 Tórshavn
Tel +298 584020 · sjovinnubudin@kallnet.fo

## Skrivstovuinnbúgv ynskist

Sóknast verður eftir góðum skrivstovumøblum, so sum skrivaraborð, reolir, skrivstovustólar, v.m.

**Ring ella skriva til 211996 / kho@post.olivant.fo**